# Klædnapløggini –
# Anna Maria 1807

## Ein granskingarverkætlan í samstarvi millum The National Archives í London, Tjóðsavnið og Fróðskaparsetur Føroya

Noomi í Dali eigur allar myndirnar, tøkk til ávíkavist Tjóðsavnið og The National Archives fyri loyvi.

Noomi í Dali, Námsvísindadeildin, Fróðskaparsetur Føroya

27. september 2024

# Prize Papers – ein stór samling á National Archives, mest skjøl og brøv, frá skipum rænd av bretskum skipum gjøgnum 165 ár (1652–1815)

Anna Maria sigldi fyri Kongliga Handilin, hon fór av Havnini 20. august 1807
Kríggj var byrjað millum Ongland og Danmark

Skipið varð rænt 2. september í 1807 út fyri norsku strondina og ført til London.
Vørurnar umborð blivu seldar

Skiparin varð seinni leyslatin, og greiddi frá at í lastini var:

> 49.000 hosupør, 8 tons av turrum fiski, 100 eskjur av ljósum,
> 250 tunnur av tálg, 19 tunnur av lýsi og 10 tunnur av fjøður.

Virðið á lastini var umleið 42.000 rígsdaler

# Skjalagoymsla

Brøv og skjøl hava ligið á goymslu í London í 207 ár

Bundnu lutirnir lógu sum privatir pakkar, goymdir saman við skjølunum.

Ein konufólkatroyggja “nattrøje” frá Niels C. Winther til Hr P Ladsen, við heilsu at konan hevði bundið hana til unnustu hansara.

Fýra pør av “fruentimmerstrømper” sum Løbner kommandantur sendi niður

Ein litaður prøvi av bundnum tilfari

Harumframt vóru prøvar av silkibondum, blondu og bummullstoyi í øðrum brøvum

# “Fruentimmerstrømper”

Sum sæst av yvirlitinum hjá skiparanum vóru 49.000 hosupør í lastini. Hetta var framleiðsla til Kongliga Handilin og gjøgnum nógv ár vórðu hosupør framleidd og útflutt.

Kommandanturin Løbner royndi at finna nýggjar møguleikar at menna framleiðsluna, og sendi tí hesar kvinnusokkarnar niður, at vita um hetta var nakað sum kundi setast í produktión.

Sokkarnir vísa hvørja góðsku tað bar til at framleiða, og at eisini tá varð hugsað um menning av útflutningsvøru.
4 pør, tey sýnast líka, men eru tó ymisk

Her er tilfar til víðari gransking, samstarv er í umbúna við granskarar í Norðurlondum og Bretlandi

# Granskingarverkætlan

Greina og samanbera pløgg á goymslu hjá Tjóðsavninum, við pløggini, sum nú eru komin undan kavi.

Fleiri troyggjur eru latnar inn uttan dagfesting, og eru torførar at tíðarfesta.

Pløggini frá Onnu Mariu hava nágreiniligar upplýsingar.

Samanberingin kann geva eina ábending um tíðarkarm, og størri vitan um bindisið og klædnamentan í Føroyum.

# Samanbering av troyggjum á Tjóðsavninum við troyggjuna frá 1807



Eitt nýbrot, at vit nú hava eina so nágreiniliga dagfesting av einum plaggi
Tað at vita, at hon er bundin eitt ávíst ár, hvør hevur bundið, og hvørjum tað er ætlað

4 konufólkatroyggjur eru á goymslu á Tjóðsavninum
"Elligamlar" hvussu gamalt er tað?

Serliga ein av teimum minnir nógv um troyggjuna av Onnu Mariu, tó at har eru munir eisini

# “Nattrøje”

Troyggjan sum varð funnin hevur týdning, av tí at hon gevur okkum eina tíðaráseting fyri góðsku, tógvi, bindisniði, tættleika

Eg fekk møguleikan at vera eina viku á The National Archives í London, har eg fekk høvi at kanna teir bundnu lutirnar.
Hetta var sera áhugavert, og gav nógv at arbeiða víðari við.

Mynstrið á troyggjuni sjálvari er væl kent, men fá hava lagt til merkis, at niðast á troyggjuni er bundin ein bordi av mynstrinum “talvborðið”

Troyggjan er reyð!





# Frá hugsanargrundarlag til vitan

Vitan um hvussu arbeitt var í Føroyum, við ull, tógv, liting og binding.

Nicolina Jensen Beder: Seyður Ull Tøting

Heimaspunnið ella handilstógv – sæst á snúðrinum
Tilfar – sæst á tægrunum
Liting – har vita vit frá Svabo (1781-1782) og Landt (1800), at tey høvdu krapp at lita reytt og indigo at lita blátt

Vanligt at lita blátt á grátt tógv



# Tógvið

Hetta hugsunargrundarlag (hypotesur) bar til at sannroyna á rannsóknarstovu, og tað varð gjørt á The National Archives, har lutirnir verða goymdir.

**Tilfar**:
Reytt og blátt: Føroyskt heimaspunnið ullint 2 tráðað tógv
Hvítt: útlendskt maskinspunnið 3 tráðað bomullstógv

**Liting**:
Reytt litað við krapp
Blátt litað á grátt tógv við Indigo
Hvítt uttan liting

# Kasta uppá og læsa av

Kastað er uppá við tveimum litum. Blátt undir og reytt omaná.

Læst er eisini av við tveimum litum, annaðhvørt eyga reytt og blátt

Her sæst sama uppákasting og avlæsing á einari av  troyggjunum á Tjóðsavninum





# Binding

**Markering við úttøku- og inntøkustrípu**
Sama strípa í liða”seymi” og ermu, onnur strípa við úttøkurnar mitt framman

**Snið**
Troyggjan er bundin heil, tær sum eru á Tjóðsavninum eru allar opnar / stimatroyggjur
Kann vera tí at hon er ætlað danskari kvinnu.

**Stokkar**
Sera fínir stokkar. Har eru 6-7 eygu og 6-7 umfør / cm.
Sum dømi kann vísast á, at ein prøvi, sum eg havi bundið á stokkum nr. 1½ er ov grovur í mun til troyggjuna

# Binding

**Bundin runt ella aftur og fram?**
Niðari kanturin við “talvborði” er bundin í tveimum, aftur og fram, síðani er bulurin bundin runt til upp undir hond, so er tikið sundur, og bundið aftur og fram, aftan fyri seg, og framman hvørju megin hálsavlæsingina hvør sær.
Ermarnar eru bundnar runt.

**Hvønn vegin er bundið**
Bulurin er bundin úr neðra, meðan ermarnar eru bundnar úr erva.
Hetta var leingi vanligi mátin.
Í einari uppskrift frá Tøtingarvirkinum (sept. 1971), til skipstroyggjur stendur m.a. “Ermur: nú eisini bundnar frá rondini” – herav síggja vit, at líka til 1970’ini var vanligt at binda ermarnar úr erva.

# Rangan er minst líka áhugaverd sum rættan

Tað er á ranguni at tað sæst, um troyggjan er bundin runt ella aftur og fram, og hvar umfarið byrjar
Tað er eisini her tað sæst hvussu tey hava loyst avbjóðingina við at mynsturtráðurin ikki endar í sama stað, tá bundið verður aftur og fram.

Munur er á ranguni á náttroyggjuni frá Onnu Mariu
Á bulinum og aðrari ermuni er hvíti mynsturtráðurin heftur við at snara um reyða tráðin
Á hinari ermuni er mestsum alla staðni bundið beint fram, uttan at hefta mynsturtráðin.

Á rættuni sæst hetta við at onnur erman kreppir seg meira enn hin.

# Hvat hendir so víðari?

Kanna, greina og samanbera troyggjuna frá Onnu Mariu við troyggjur á Tjóðsavninum.

Kanna troyggjur aðrastaðni, sum koma úr Føroyum, m.a. er ein troyggja í Edinburg, sum stendur at vera føroysk og frá 1850.

Kanna, greina og samanbera sokkarnar frá Onnu Mariu við hosur funnar í Keypmannahavn, í samstarvi við granskarar har.






# Keldur

Beder, Nicolina Jensen (2010): *Seyður Ull Tøting*, Sprotin, Tórshavn 2010
Debes, Lucas (1673): *Færoæ et Færoa reserata*
Landt, Jørgen (1800): *Forsøg til en Beskrivelse over Færøerne,* Kjøbenhavn
Svabo, Jens Christian (1781-1782): *Indberetninger fra en reise i Færøe 1781 og 1782*, C.A Reitzels forlag, København 1976

The National Archives, grein (2024)
https://www.nationalarchives.gov.uk/about/news/pristine-sweater-found-in-parcel-posted-in-1807/
Tjóðsavnið: bundnar stimatroyggjur, lutir kannaðir 2024
Tøtingarvirkið (1971): *Skipstroyggjur,* Estra (bindivegleiðing til skipstroyggjur)

**Tøkk til Margrethu Nónklett og Súsonnu Joensen á Tjóðsavninum**
**Thanks to the National Archives, London, for access to the artefacts, and help with the research**

Vísindavøka